Sosialurin

Nr. 196 - 10. oktober 2007

# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit leggja okkum ikki á knæ fyri generalunum. At tingast undir tílíkum treytum er nyttuleyst*

*(burmesiska andstøðan)*

# Turkaland ætlar at senda herin inn í Norðurirak

**Turkiski herurin vil sleppa um irakska markið at jagstra kurdiskar álopsmenn, men USA mutar ímóti**

Leiðslan í turkiska stjórnarherinum er í øðini inn á kurdiskar álopsmenn, sum hava beint fyri 15 stjórnarhermonnum teir seinastu dagarnar.

Trupulleikin hjá herinum er, at teir kurdisku álopsmenninir fjala seg í Norðurirak, men nú hevur herleiðslan mist tolið og hevur biðið stjórnina um loyvi til at fara um markið eftir álopsmonnunum. Í gjár gjørdi Tayyip Erdogan, forsætisráðharri, av at gera eftir áheitanini frá herinum, og hann hevur nú biðið tjóðartingið staðfesta avgerðina hjá stjórnini.

Amerikanska stjórnin er harðliga ímóti, at turkiskir hermenn fara inn í tann kurdiska partin av Irak, og hon hevur biðið stjórnirnar í Ankara og Irak loysa málið. Amerikanska herleiðslan hevur ávarað um, at tað kann fáa sera álvarssamar avleiðingar fyri trygdina í Norðurirak, um Turkaland sendir hermenn um markið aftan á kurdisku álopsmonnunum.



*Tayyip Erdogan hevur givið herinum loyvi at senda hermenn um irakska markið, sjálvt um USA sigur nei*

# Aung tók ikki av

**Andstøðan í Burma vil ikki tosa við generalarnar undir teimum treytum, sum generalarnir løgdu við**

- Skal nakað koma burtur úr tingingum, mugu báðir partar vera sonnaðir at lata og at taka. Tað dugir ikki, at bara annar parturin fær treytir, sigur burmesiski andstøðuflokkurin NLD.

Í síðstu viku boðaði hernaðarstýrið frá, at tað var sinnað at tingast við NLD og leiðaran, Aung San Suu Kyi, men við teirri treyt, at andstøðan skuldi taka frástøðu frá mótmælisgongum og útlendskum tiltøkum ímóti hernaðarstýrinum. Men hesa treyt vil Aung San Suu Kyi ikki ganga undir.

- Vit fara ikki at leggja okkum á knæ fyri generalunum, stendur í fráboðanini frá flokki hennara.

Aung San Suu Kyi hevur sitið í húsavarðhaldi seinastu nógvu árini, og generalarnir hava boðað frá, at hon sleppur ikki leys.




*Í fleiri londum í Asia ganga fólk stuðulsgongu til frama fyri andstøðuna í Burma. Hendan myndin er úr Teilandi í gjár*

# Danir leggja ikki í at arbeiða meiri

**Danska stjórnin ætlar at geva teimum skattalætta, um teir vilja arbeiða meiri enn nú, men tilboðið hevur lítlan áhuga**

Vanliga er skattalætti søtur tónleikur í oyrunum hjá fólki, men nú vísir ein kanning í Danmark, at har fellur orðið ikki so væl í oyruni á fólki longur.

Í einari roynd at lætta trýstið á arbeiðsmarknaðin hevur stjórnin skotið upp, at fólk, sum arbeiða meiri, skulu sleppa lagaligari í skatti. Men eftir kanningini hjá Institut for Konjunkturanalyse hevur tilboðið frá politikarunum lítlan áhuga.

- 75 prosent av donsku arbeiðsmegini vilja ikki arbeiða meiri, sjálvt um tey fáa skattalætta, sigur Thomas Søby, sum hevur staðið fyri kanningini. Hann leggur afturat, at av teimum almennu starvsfólkunum siga heili 80 prosent nei takk til tilboðið um skattalætta aftur fyri meiri arbeiði, og áhugin er heldur ikki stórur millum teirra, sum arbeiða hálva tíð, sigur hann.

- Vandin fyri at gerast arbeiðsleysur er sera lítil. Arbeiðsloysið minkar støðugt, danski búskapurin virkar væl, og fólk hava sjáldan havt tað betur enn nú. Teimur tørvar ikki meiri, sigur Thomas Søby við danska útvarpið.

## STUTT SAGT

### Gore kann fáa friðarheiðursløn

Norska Nobelnevndin hevur fingið uppskot um 135 einstaklingar og 46 felagsskapir, nú nevndin skal gera av, hvør skal fáa ársins friðarheiðursløn. Millum einstaklingarnar, sum verða hildnir at ghava bestu møguleikarnar at fáa heiðursлønina, eru fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore, polska kvinnan Irena Sendler og leiðarin í altjóða veðurlagsnevndini hjá ST, Rajendra Pachauri. Onnur, sum verða hildin at hava ein møguleika, eru finski friðarsemingsmaðurin Martti Ahtisaari og fyrrverandi talskvinnan hjá inuittunum, kanadiska Sheila Watt-Cloutier. Avgerðin hjá norsku Nobelnevndini verður almannakunngjørd fríggjadagin klokkan 10.

### Olmert avhoyrdur

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, var aftur í gjár til avhoyringar hjá løgregluni. Olmert er partur av einum rættarmáli um svik, tí løgreglan hevur illgruna um, at alt fór ikki rætt fram, tá næststørsti bankin í Ísrael, Bank Leumi, bleiv einskildur fyri tveimum árum síðani. Tá var Ehud Olmert fíggjarmálaráðharri, og sambært illgrunanum hjá løgregluni royndi hann at ávirka handilin á ein tílílan hátt, at nakrir av kenningum hansara skuldu fáa meiri burtur úr handlinum. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Ehud Olmert er settur í samband við svik, men hann er ongantíð dømdur.

### Framstig í Moskva

Forsetarnir Vladimir Putin í Russlandi og Nocolas Sarkozy í Fraklandi hava verið ríkandi ósamdir um kjarnorkuætlaninar hjá Iran. Í gjár hittust teir í Moskva, og har segði Sarkozy, at framstig vóru hend í málinum. Hann vildi tó ikki siga, hvat tað merkir. Sarkozy segði, at fundurin teirra millum er týðandi, tí í næstu viku fer Putin til Iran at tosa við leiðararnar har.